Føroysk list til ferðafólkið hjá DANAIR



DANAIR fer nú at breiða út kunnleikan og alskin til dygdargóðu føroysku listina

Komandi ár fær ferðafólkið á Nordic Class eina eftirgerð í A4 stødd av 12 ymsum landslagsmálningum úr Føroyum.

Seks ymiskir listamenn lata tvær myndir hvør. Hin eina verður latin ferðafólkunum á útferini og hin á heimferðini. Tær eru prentaðar á frálíkt pappír og eru klárar at seta í rammu og hanga upp. *Danair* fer eisini at nýta eftirgerðirnar sum heilsan til vinir og viðskiftafólk, sigur Gunnar Tietz, stjóri í *Danair*.

Bárður Jákupsson fyrsti listamaður

Myndarøðin byrjar við Bárði Jákupssyni (føddur 1943). Hann er ein av føroysku listamonnunum, sum alsamt finnur okkurt nýtt í føroyska umhvørvinum. Landslagsmyndir hansara eru næstan klassiskar. Seinnu árini er hann komin langt við pappírsklippi. Grovu, sprotnaðu fjøll og firðir hansara saman við neyvt kliptu fuglunum eru ein framhaldandi menning av norðuratlantiska myndamálinum.

Bárður Jákupsson hevur fingið útbúgving á Kunstakademinum í Keypmannahavn hjá Mogens Andersen, professara. Í norðurlondum hevur hann luttikið í fleiri felagsframsýningum og prýtt fleiri høli í Føroyum. Hann hevur teknað føroysk frímerki, prýtt bøkur og er dagligur leiðari í Listaskálanum í Havn, har eisini hansara egna list er umboðað.

Kurt Svendsen, sum eigur Galleri Sct. Gertrud í Keypmannahavn, hevur sera góðan kunnleika til føroyska list. Í samstarvi við hann hevur *Danair* valt eina rað av listaverkum, sum umboða nútíðar føroyska list.

Í døgunum 3. til 12. desember 1988 verða syndar myndir av Jákupssyni í Galleri Sct. Gertrud.





Sunnur og góður ungdómur — við ábyrgd

Í Havnini er hópur at taka sær til hjá ungdómi. Vit hava væl virkandi itróttarfeløg, ið gera eitt avbera stórt arbeiði fyri ungdómin, vit hava eina aktiva skótarørslu, vit hava samkomur, ið nýta nógva orku í ungdómsarbeiði sínum og vit hava eina kvøldskúlaskipan, ið hevur hóp av tilboðum til øll — ung sum eldri.



Men hóast hetta, so er ein partur av ungdómi okkara, ið ikki tekur lut í nøkrum av omanfyri nevnda. Vit eiga at ansa, at vit ikki »missa« henda ungdóm. Fremmanda ávirkanin á mentan okkara er stór. Hvønn dag floymir hópur av ymiskum fremmandum inn yvir okkum, gjøgnum sjónvarp ella gjøgnum blað. Ikki er alt hetta, sum verður borðreitt fyri okkum, av tí besta, og tíverri taka vit partar av tí, ið vit heldur áttu at verið fyri uttan, til okkum.

Tey, ið eru aktiv innan onkran felagsskap, eru oftast betri fyri at duga at skyna á hvat er gott og hvat er ringt av hesi áivrkan, meðan tann, ið stendur einsamallur og einki hevur at takast við, lættari letur seg ávirka.

Vit eiga at bera so í bandi, at allur ungdómur okkara hevur okkurt gagnligt at taka sær til í fritíð sini. Og her mugu vit ásanna, at tað er partur av ungdómi okkara, ið ikki dugur at siggja at nakað av tí, sum verandi feløg ella samkomur kunnu bjóða, er nakað fyri hann. Eisini hevurm parti av ungdómi okkara mugu vit rokka og vil Javnaðarflokkurin tí virka fyri, at ungdómshús við fritíðarvegleiðarum verða sett á stovn. Ungdómurin skal sjálvur skipa fyri virkseminum í hesum húsum, men holl vegleiðing skal tó standa honum í boði.

Sunnur og góður ungdómur er trygd fyri framtíðar Havnini. Havnini sum vit øll skulu liva í. Um vit ikki vísa ungdóminum at vit hava álit á honum og geva honum ábyrgd, kunnu vit ikki rokna við, at hann hevur álit á okkum.

Bente Kjær

Flestar kilometrar uppá liturin



Uno

Bilfríðkan 17300